gult4 cyan4 magenta4 svart4



# Jazzfestivalurin byrjaður



**Í gjárkvøldið byrjaði tann 18. Jazzfestivalurin við tónleiki frá framúrskarandi danska bassistinum Niels Henning Ørsted-Pedersen.**

JAZZUR
*Rúnar Reistrup*
*Myndir: Jens K. Vang*

Tann árligi Jazz-, Fólka- og Blues festivalurin, sum annars var líka við at hava upplivað sítt seinasta summar í fjør, tá Listastevna Føroya varð stáplað upp á beinini, vendi aftur mikukvøldið í fullum blóma. Setanin var, eins og undanfarnu árini, í Norðurlandahúsinum, og tað var eisini har, at konsertirnar á skránni mikukvøldið vórðu spældar.

Men í mun til undanfarin ár, tá Jazzfestivalurin so at siga ikki fór út um húsið, so fer Jazzfestivalurin ikki inn aftur í Norðurlandahúsið á hesum sinni. Heldur fer hann nú út at reika í høvuðsstaðnum har so ymisk støð sum Vesturkirkjan, Platform, Listaskálin, Hotel Hafnia, Dómkirkjan, Sjónleikarhúsið og onnur eru karmur um hendan Jazzfestivalin, tann átjanda í røðini.

Skráin á fyrsta kvøldinum á Jazzfestivalinum byrjaði við Niels Henning Ørsted-Pedersen, sum verður nevndur sum høvuðsnavn á hesum Jazzfestivalinum. Við sær hevði hann danska klaverleikaran Ole Kock Hansen.

Í Klingruni vóru tríggjar smærri konsertir við vísusangarum úr ávikavist Íslandi, Grønlandi og Álandi, og kvøldið endaði við glaða jazzorkestrinum »Jens Nørholms Jazz Family« í konserthøllini.









gult5 cyan5 magenta5 svart5



# Vilja ikki hava fleiri brekað í grannalagið

**Fólk búsitandi í Smærugøtu vilja ikki hava fleiri sambýli ella bústovnar, har menningartarnað fólk búgva. Frammanundan eru tveir bústovnar í grannalagnum, og arbeitt verður við at keypa enn eini hús í gøtuni til hetta endamálið**

SAMBÝLI
*Stefan í Skorini*

Fólk í Smærugøtu í Hoyvík mótmæla harðliga, at arbeitt verður við at keypa eini hús í gøtuni við tí endamáli, at menningartarnað flyta inn í tey.

Grannarnir vísa á, at longu nú eru tveir bústovnar í grannalagnum, og um henda ætlanin verður fullførd, so fara tveir bústovnar og eitt sambýli at liggja innanfyri 75 metrar frá hvørjum øðrum.

Hetta halda grannarnir vera ov mikið. Mark skuldi verið fyri, hvussu nógvir slíkir stovnar kunnu vera í sama øki, tí tað er tyngjandi fyri grannalagið. Tí hava nøkur húsarhald í Smærugøtu tikið stig til eitt skriv, har tey hava nakrar fyrispurningar og lýsa málið frá teirra sjónarhorni. Skrivið er sent landsstýrismanninum við Almannamálum, Sámal Peturi í Grund og leiðaranum á Serstovnadeildini, Bjarna Clementsen. Tey hava eisini savnað undirskriftir til skrivið.

## Gera bart beinanvegin

Tað er eitt íbúðarfelag hjá Almanna- og Heilsumálastýrinum, ið stendur fyri keypinum av einum stórum húsum í Smærugøtu 29. Sjálvsognarstovnurin Sambýlir, ið verður stýrdur av eini nevnd, leigar síðani húsini út til Serstovnadeildina, sum veitir menningartarnaðum tak yvir høvdið. Endamálið hjá stovninum er at keypa og reka hús, sum Serstovnadeildin kann leiga.

Grannarnir leggja dent á, at teir ikki hava nakað ímóti øðrvísi menniskjum, og tey, sum frammanundan eru búsitandi í økinum, eru vælkomin. Hinvegin er tað ikki rætt, at leggja fleiri stovnar saman í einum lítlum øki.

»Hvussu nógvir tílíkir stovnar kunnu trunkast saman í einum íbúðarøki, sum als ongan stovn hevði frammanundan«, verður spurt í skrivinum til myndugleikarnar. Tey halda tað vera skilaleyst at savna tey brekaðu samanaftur við tilvildarligum keypi av sethúsum, ið liggja tætt saman.

Fólk í Smærugøtu, ið Sosialurin hevur tosað við, siga, at tey vilja gera vart við trupulleikan, áðrenn húsini eru keypt, og áðrenn nøkur avgerð er tikin. Soleiðis vóna tey at sleppa undan, at nakað verður kroyst omanyvir tey.

Tey siga, at fleiri fólk í gøtuni vanliga hava hurðarnar stongdar, tí tey kenna seg ikki væl við so nógvum menningartarnaðum í grannalagnum. Tey halda, at slíkir stovnar skulu spjaðast runt um í Havnini.

## Gjalda okursprís

Sjálvsognarstovnurin Sambýli hevur bjóðað upp ímóti tveimum milliónum krónum fyri húsini. Grannarnir eru eisini firtnir um, at sjálvsognarstovnurin er sinnaður at lata so nógvan pening fyri húsini.

Tey halda, at almennir pengar eru við til at trýsta húsaprísin uppeftir, og tað er skeivt, tí á tann hátt missa barnafamiljur at møguleikan at keypa, tá tey ikki kunnu bjóða ímóti stovninum.

Tey, ið hava skrivað undir, vóna, at teirra íkast til málið verður tikið til eftirtektar, tí annars verður tað keðiligt at vera í gøtuni, tá so nógvir stovnar til menningartarnað verða savnaðir í gøtuni.



*Ætlanin er, at hesi húsini skulu nýtast til sambýli hjá brekaðum. Grannarnir í Smærugøtu vilja ikki hava fleiri slíkar stovnar í grannalagnum. Tí mótmæla tey harðliga*

*Mynd: Jens Kr. Vang*




Bjarni Clementsen, leiðari á Serstovnadeildini:

# Vit eru í svárari húsaneyð

**Bjarni Clementsen er leiðari á Serstovnadeildini, og hann sigur seg hava ein stóran bústaðartrupulleika at loysa, og tí verða grannarnir ikki eftirspurdir, áðrenn sambýli verða keypt**

SAMBÝLI
*Stefan í Skorini*

Bjarni Clementsen er ikki samdur við búfólkum í Smærugøtu. Hann vísir á, at tey brekaðu skulu hava eitt stað at búgva, og at tað er als ikki lætt at finna eini hóskandi hús í Havndini.

– Vit hava bjóðað uppá 4-5 hús í Havnini tað seinasta árið, men tað hevur ongantíð eydnast okkum at keypa húsini, tí altíð onkur hevur bjóðað yvir, sigur Bjarni Clementsen, sum sigur, at tey hava tørv á einum húsum at hýsa brekaðum, og tí mugu tey keypa. Bústaðartrupulleikin hjá teimum brekaðu skal eisini loysast.

Hann vísir á, at fá hús í Havn eru egnað til sambýli, tí tað krevst, at tey eru stór. Tá so ein møguleiki býðst, so mugu tey vera tilreiðar at keypa.

Spurdur um hann heldur tað vera rímiligt at leggja tríggjar stovnar í sama øki, sigur Bjarni, at hann heldur ikki, at hetta fólkaslagið eru serliga tyngjandi fyri grannalagið.

Hann er ikki samdur í, at teirra íbúgvar ovbyrja grannalagið, tá havt verður í huga, at tey ikki ganga nógv úti og spæla og annað. Fólk við álvarsomum atferðartrupulleikum hava vanliga hesar trupulleikar inni í sambýlinum, vísir Bjarni á.

## Afturvendandi trupulleiki

Leiðarin á Serstovnadeildini vísir á, at hetta er ein afturvendandi trupulleiki, at fólk ikki vilja hava sambýli ella bústovnar í grannalagið. Vanliga royna tey at fáa samband við grannarnar og greiða frá, hvat málið snýr seg um. Eisini verða grannarnir bjóðaðir inn í húsini. Sum oftast leggja bylgjurnar seg aftur.

Bjarni er heldur ikki samdur í, at tað almenna er við til at trýsta prísirnar uppeftir. Hann vísir á, at øll hava rætt at bjóða uppá eini hús á privata marknaðinum, og húsini høvdu farið fyri eina slíka upphædd undir øllum umstøðum.

Endamálið við keypinum av húsunum er at flyta tey brekaðu, ið halda til í Turiðargøtu, sum stutt haðani, til eitt komandi sambýli í Smærugøtu.

Enn er tó einki komið uppá pláss viðvíkjandi handlinum, og tí liggur einki fast.